# Tær nýggju krossferðirnar

*Viðkomandi og væl frágingið essaysavn um politiskt-religiøsar tvídráttir í okkara tíð*



UMMÆLI
*Eftir Hanus Kamban*




### Átrúnans afturkoma

Í tí slóðbrótandi skaldsøguni *Niels Lyhne*, frá 1880, eftir danska rithøvundin J.P. Jacobsen, ger høvuðspersónurin sær, í eini samrøðu við ein kenning, á eini matstovu í Keypmannahavn, sínar tankar um eina framtíð, tá ið menniskjan hevur lagt trúnna á Gud aftur um seg. Henda mannahugans metamorfosa fer at frígera kreftir og orku, sum nú eru niðurbundin, tænarar framman fyri einum tómum altari, og tá hon er fullførd, fer mannaættin endiliga at kunna víga allan tann kærleika, hon fyrr gav Gudi, til arbeiðið fyri at skapa eitt betri samfelag, eyðkent av góðsku, rættvísi og vísdómi.

Henda framtíðarmynd, sum seyg sær føðslu úr tonkunum hjá upplýsingarfilosoffunum og hjá heimspekingum sum eitt nú Hegel ella Feuerbach, var púra vanlig tá á døgum, tá radikalisman enn var ung og sakleys. Georg Brandes, Henrik Ibsen, Oscar Wilde, Bernard Shaw, Ellen Key, øll fingu tey eitt skifti glamp í eyguni av hesi góðtrúnu profeti.

Í dag vita vit betur. Víst hava nøkur fá lond, teirra millum Norðurlond, megnað at skapa samfeløg, sum í mongum lutum eru meira framkomin til vælferð enn tátíðar samfeløg. Men utopia er ikki í nánd, og mong stór ríkir, sum í 20. øld andbráð toygdu seg eftir bráðsjónanna gylta eldorado, sukku bara longur niður í neyð og ruðuleika. Og religiónin er hvørki viknað tíansheldur deyð í raki, men hevur tey seinnu árini ment seg og er nú tætt við, við fullum seglum, at leggja tað politiska lívið víðahvar undir seg.

Og ikki bara tað, samstundis sum vit í m.a. lívfrøði, læknakynstri og mikrotøkni taka okkum fram við risalopum, hopa vit í okkara samskifti, hvør tjóð og hvør mentan við aðra, aftureftir, so at vit nú tala og skriva um eina nýggja miðøld. Tað er sigandi, at tann franski professarin Gilles Kepel rópar eitt av sínum verkum, har hann viðger møtið millum tann arabiska heimin og vesturheimin: *Tær nýggju krossferðirnar*.

### Fjølbroytt greinasavn

Um hetta evni hava tveir unglingar, Heini í Skorini og Páll Holm Johannesen, lagt til rættis eitt greina- og essaysavn, teir rópa *Krossvegir*, við undirheitinum "um átrúnað og politikk". Ritstjórarnir eru blaðmenn, annar hevur lokið prógv í stjórnmálafrøði, og hin er væl ávegis fram at sama máli. Tann, sum hevur havt eyguni eftir teimum, hevur varnast, at teir sum heild eru dugnaligir blaðmenn, og at teirra arbeiði, eisini har tað snýr seg um formalia sum málburð og stavseting, er væl frágingið. Ein uggi at vita sær, í okkara illgjørdu og gæsutu tíð.

Í hesum verki eru fimtan tekstir, sum tykjast at umboða eina veiftru av sera ymiskum vinklum, evnisøkjum, sjónarmiðum og viðgerðarsløgum. Her hitta vit menn og kvinnur, trúgvandi og tortrúgvin, ta subjektivu og ta sakligu viðgerðina, tað makrokosmiska løriftið og okkara lítla, atlantska mikro-univers. Í ikki fáum greinum finna vit, annaðhvørt sum miðdepil í viðgerðini, ella sum tann fjalda undirtekstin, spurningin um samkynd og málið um greinina 266b, sum tað lukkaðist tveimum djørvum politikarum, eftir mikið kjak og rok, at fáa samtykta á tingi í fjør.

### Valayat-e Faqih

Sum dømi um, hvat hetta verk hevur at bjóða, kann eg taka greinina "Millum Eden og Armageddon" eftir Heina í Skorini. Hetta er eitt slag av sakligari yvirlitsgrein, har hugt verður at, hvussu átrúni, eftir langa tíð í gloymsli, hevur trokað seg fram í tað globala politiska rúmið. Høvundurin lýsir orsøkina til okkara átrúnaðaramnesi og nemur her m. a. við fyribrigdið eurosentrismu, leitar aftur til trúbótina og tann westfalska friðin í 1648, nemur við upplýsingartíðina og nærkast aftur nútíðini og lýsir klútateppið av religiøsum, religiøst-sosialistiskum og teokratiskum rørslum eitt nú í Miðeystri, í Suðuramerika og í USA.

Henda grein er sera greið, hon tykist skrivað út frá einum yvirskoti av vitan um evnið, tónin er sakligur, og tað er vælgerandi, at eingin dygdarmunur verður gjørdur á islamskum og kristnum rákum. Tá ið høvundurin nevnir, at *sharia*-løggáva byggir á Koranina, er hetta helst rætt, eg haldi meg tó hava lisið, at henda løggáva í eini vissari vídd er eitt slag av uppískoyti, skapt av seinnu tíðar islamskum skriftlærdum, tí sonevna *ulama*. Í hvussu so er, hevur í Islam í øldir verið ósemja um, hvørt Koranin er lóg ella bara vanligar religiøsar forskriftir uttan lógartign.

Í eini grein av slíkum slag ber illa til at lýsa allar krókar út í æsir. So eg fari til stuttleika, í sambandi við at Khomeini ayatolla verður umrøddur, at nevna tað stak áhugaverda hugtakið *Valayat-e Faqih*. Við hesum gudfrøðiliga kvantlopi gav Khomeini sær sjálvum sama guddómliga og lýtaleysa myndugleika, sum upprunaliga hoyrdi tí fjalda imaminum (Ismail, sum doyði í 874, og sum nú verður dyrkaður sum *Mahdi*, frelsarin, sum kemur aftur á dómadegi) til. Tey, sum minnast Jim Jones og hansara ríki, munnu fata, hvat slík óhugnalig hugmóð kann hava við sær.

### Átrúni og politikkur

Ikki minni áhugaverd, men á heilt annan hátt, er greinin "Illviljin móti átrúnaði er eitt álop á fólkaræðið" eftir Rúna Rasmussen. Eg kenni høvundin sum ein bæði dámligan, vitandi og høviskan ungling, og tað undrar meg ikki, at tónin í hesi grein samsvarandi er hóvligur og orðalagið mentað. Men eg eri als ikki samdur við Rúna í mongum, hann førir fram, og fari, nettupp av virðing fyri honum, at siga hví.

Ikki tí, tann akademiska viðgerðin, har greitt verður frá átrúna sum natúrligum og loyvdum parti av tí politiska rúminum og m.a. víst til Rawls og Habermas, er ivaleyst í samsvari við veruleikan. Men stórur partur av tekstinum minnir um eitt slag av skuggatelvan við ein mótpart, sum ikki er til. Politikkur er tengdur at virðum, hetta er sjálvsagt, um hetta er mær vitandi full semja, og eins og kristin hava ein moral, hava agnostikarar og ateistar eisini ein moral. Ja, tað áhugaverda er, at hesi seinastu ikki sjáldan umboða tey kristnu virðini betur enn mangur kristin.

George W. Bush er í dag ímyndin av einum kristnum statsmanni. Ivaleyst hevur hann gjørt okkurt rætt og gott. Men hann hevur samstundis sett í verk píning móti ósekum menniskjum, hann hevur skrivað undir eitt ótal av deyðadómum, hann hevur íbirt eitt kríggj, sum hevur kostað 5-600.000 fólkum lívið og gjørt tvær milliónir til flóttafólk, og tá ið ódnin Katrina herjaði í New Orleans, sveik hann tey, sum Kristus kallar "míni minstu". Mikhail Gorbatsjov, hinvegin, bjargaði, tá USSR liðaðist sundur, við sínum politiska hóvsemi tí velduga ríkinum frá kríggi og einum uppaftur størri ruðuleika enn tí, sum tá kom. Hvør av hesum umboðaði tey kristnu virðini á meira sannførandi hátt?

### Virðir og dogmatikk

Í síni roynd at umrøða sambandið millum átrúna og politikk fløkir Rúni, eftir mínum tykki, hugtøkini saman. Tí sum longu nevnt er politikkur ongantíð virðistómur. Men tað er líka so greitt, at religión, sum dogmatiskt fyribrigdi, ongan rætt hevur at valda í tí politiska rúminum. Halgabók krevur, sum vit vita, at samkynd skulu takast av døgum. Tað hevði verið nossligt, um slík løggáva slapp fram at í Europa. Annars ræða sporini, eitt nú í Iran, har tey samkyndu, har við støði í eini aðrari halgari bók, verða steinað í hel.

Men høvuðspróvgrundin fyri, at ein samanvavstur av átrúna (í dogmatiskari merking) og politikki er vandamikil, er henda: Ein politikara, sum sigur seg umboða Gud, kanst tú ongantíð líta á, møguleikin fyri, at hann bara umboðar sína egnu, avmarkaðu, lítlu verð, ella at hann enntá er ein falskur profetur, sum kanska umboðar tað øvugta av tí, hann sigur, er altíð til staðar. Eina ferð enn kunnu vit, sum ræðandi skrímsl, nevna Khomeini, Jim Jones og – hví ikki – Adolf Hitler, sum mong kristin í hansara samtíð sóu í eini guddómligari glæmu.

### Demokrati og teokrati

Tann greiðasta, mest pedagogiska og samstundis hvassasta greinin í hesum savni er tann, sum stendur fremst, hon hevur heitið "Demokratiskt frælsi og teokratiskt ófrælsi", og høvundurin er Sjúrður Skaale, samfelagsfrøðingur. Sjúrður fer beint til sakina og ger við klárum orðum greitt, hvat munurin er millum fólkaræði og teokrati, og hví religión (sum dogmatisk stevna) og politikkur eiga at verða sundurskild. Tað er í hesum sambandi sera áhugavert, at høvundurin einki hevur ímóti átrúna í sær sjálvum, tvørturímóti, tí, sum hann sigur, "kristindómurin er partur av okkara

*Krossvegir er eitt stak áhugavert og virðismikið íkast, um aktuell og viðkvom evnir, til orðaskiftið í Føroyum. Eyðkent fyri allar tekstirnar er, at teir, hvassir sum hóvligir, objektivir sum persónligir, eru skrivaðir við einum lagaligum og mentaðum tóna*